# CTD



*Jenis av Rana*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Eisini er sett á stovn screening av nýføðingum í Føroyum fyri CTD, umfram 14 aðrar screeningar.

Í munnliga fyrispurninginum spyr Jenis av Rana eisini, um tað er rætt, at føroyingar gjalda alt ov høgan prís fyri hvørja diagnosustillandi kanning – hóast tær kunnu gerast í Týsklandi fyri ein brotpartprís av tí kostnaði, vit gjalda danskari starvsstovu?

Til hetta sigur landsstýrismaðurin, at tað er rætt, at einstøku kanningarnar fyri ein stóran part verða gjørdar í Danmark. Prísurin í dag er umleið 3.000 kr. Onkrar kanningar eru gjørdar í Týsklandi, men orsaka av samstarvsviðurskiftum og ráðgeving hevur Landssjúkrahúsið fyrst og fremst valt Klinisk Genetisk Deild á Rískissjúkrahúsinum til at gera karnitin screeningar, meðan Amplexa í Odense vanliga ger genetisku screeningina. Um farið verður indir størri tal av kanningum, til dømis at kanna allar føroyingar ber væntandi til at fáa ein væl lægri eindarkostna. Hvar møguligar kanningar verða gjørdar framyvir verður eisini tikið við í viðgerðina millum landslæknan og Heilsumálaráðið eftir tilráðing er fingin frá danska Heilsustýrinum.

**Í viðmerkingunum til fyrispurningin sigur Jenis av Rana soleiðis:**
Meðan heimurin annars fyrireikar seg sum best í sambandi við nýggju beinkrímsjúkuna, eru nakrar føroyskar familjur og einstaklingar, sum undrandi og ikki sørt rødd, enn bíða eftir almennari kunning og tilmæli um CTD sjúkuna, sum longu hevur tikið lívið hjá mongum av teirra kæru.

6. oktober 2008 bar Sosialurin tíðindi um eina deyðiliga sjúku, greinin nevnist Duld Dreparasjúka í Føroyum. Í greinini stendur at lesa, at sjúkan fyrstu ferð var kend í 1995, og yvirlækni upplýsir í greinini, at mong kunnu vera deyð av sjúkuni. Eisini lat Flemming Skovby, professari og gengranskari á Ríkissjúkrahúsinum okkum vita, at um tey, ið hava sjúkuna, ikki verða funnir og koma í viðgerð, doyggja hesi longu sum børn- ella av hjartasteðgi, tá tey eru vaksin

Í greinini boðaði Landsstýrismaður í heilsumálum frá, at sjúkan hevur, óvanliga stóran títtleika millum føroyingar – nógvar ferðir størri enn aðrastaðni í verðini, og at hettar mál verður tikið í stórum álvara.

Tann 3. apríl 2009 veit Dimmalætting, undir yvirskriftini, Eitt makaburt roknistykki um lív, at siga, at landsstýrismaðurin enn bíðar eftir einum tilmæli frá landslæknanum, eitt tilmæli, sum m.a.skal brúkast til at finna útav, um tað loysir seg at finna teir føroyingar, sum eru sjúkir ella berarar.

Kostnaðurin fyri at kanna føroyingar fyri sjúkuna CTD sigst, sb. omanfyrinevndu grein í Sosialinum, vera kr.7.500,00 fyri hvønn, tað vil siga áleið kr. 360 milliónir fyri allar føringar, um hetta verður gjørt á donskum starvsstovum.

Móti hesum verður av einum áhugabólki fyri sjúk ført fram, at prísurin í Týsklandi er kr.100,00 fyri hvørja carnitin/genkanning, tvs. minni enn 5 mió. fyri allar føringar.

# Fara at gera meira heilivág móti CDT

**Landsapotekarin hevur bílagt eina stóra nøgd av ráevni úr Sveis til at framleiða heilivág móti líkshættisligu sjúkuni CDT. Skulu øll skannast, verður brúk fyri nógvum helivági,og vi at keypa rávøruna úr Sveis, verður heilivágurin væl bíligari**

CDT
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Bæði í Danmark og í Føroyum stendur á at fáa nóg mikið av heilivági til at viðgera fólkini, sum hava fingi staðfest lívshættisligu sjúkuna CDT.

Men nú er apoteksverkið í Føroyum komið væl á leið at fáa loyst tann trupulleikan.

- Vit hava arbeitt nógv við hesum, og tað hevur eydnast okkum at koma í samband við eina verksmiðju í Sveis. Haðani hava vit bílagt stóra nøgd av ráevnunum, tí vit fyrireika okkum til, at eftirspurningurin fer at økjast.

Higartil hevur føroyska apoteksverkið keypt ráevnini og heilivág úr Danmark, og kostnaðurin hevur verið ovurhonds høgur. Hetta kemur av, at evnini í Danmark ikki eru skrásett sum heilivágur.

## Bíligari

- Vit hava heimild til at skráseta heilivágin sum heilivág, og tí kunnu vit framleiða hann fyri ein heilt annan kostnað, sigur Heri Mørkøre, sum ásannar, at sjúkan higartil hevur verið undirmett.

Eftirspurningurin eftir heilivágnum er ikki vaksin seinastu tíðina, men verður tað til, at øll skulu skannast, verður tørvur á nógvum heilivági, og tí hevur apoteksverkið bílagt ríkiligt av rávøru úr Sveis. Tilbúgvingin er harvið til tað.

Summi við sjúkuni CDT fáa flótandi heilivág, onnur fáa tablettir.

## Bíða eftir barnalæknanum

Hvussu framleiðslan verður




*Tjaldurs Apotek fær nú rávøruna úr Sveis til at gera heilivágin, sum harvið verður væl bíligari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

í Føroyum hereftir, kann Heri Mørkøre enn einki siga um, tí fyrst av øllum skal hann hava fund og tosa nærri við barnalæknan Ulrike Steuerwald, sum hevur gingið á odda í arbeiðinum við at hjálpa teimum, sum hava hesa sjúkuna. Hon kemur til Føroya í morgin. Tey far at tosa um, hvussu heilivágurin kann passast til, so hann verður so behagiligur sum gjørligt fyri sjúklingin at taka.

Heri Mørkøre sigur, at tað er ikki so lætt at fáa hendur á rávøruni, og tað kemur av, at tá ið evnið skal brúkast til framleiðslu av heilivági, eru krøvini til góðskuna strangari. Men tað hevur so eydnast føroyska apoteksverkinum at finna ein framleiðara.